## Demokratiið viknar eystanfyri

Hugtøk sum kapitalisma og demokrati eru ikki so høgt í metum í fleiri av teimum fyrrverandi sovjetsku lýðveldunum og londunum í Eystur- og Miðevropa sum fyri 20 árum síðani, tá múrurin í Berlin fall. Ein meiningakanning, sum Pew-stovnurin í Washington hevur gjørt, vísir, at í Ukraina eru bara 30 prosent fegin um fleirflokka-skipanina. Tað áskoðanina høvdu 72 prosent í 1991. Í gamla Eystur-týsklandi er stuðulin til demokratiið minkaður heili 85 prosent, og í Ungarn er undirtøkan fyri marknaðarbúskapi minkað 34 prosent tey seinastu tjúgu árini.



## Godmother í fongsul

Í Kina hevur ein kvinna fingið 18 ára fongsul fyri at hava staðið á odda fyri einum brotsmannakervi í býnum Chonqing. Kvinna, sum hevur gingið undir heitinum "The Godmother 2", varð millum annað dømd fyri at hava rikið ólógligar spælihallir og fyri at hava mutrað myndugleikar. Kinesisku fjølmiðlarnir skriva, at rættarmálið ímóti brotsmannadrotningini í Chinqing er úrslit av einum stórum átaki, sum hevur avdúkað fleiri brotsmannalið ymsastaðni í landinum.

# Sørvágur fær nýggjan musikkskúla

**- Nýggi skúlin fer uttan iva at skapar betri karmar um tónleikalív og ymisk mentanarlig tiltøk í kommuni í síni heild, sigur borgarstjórin í Sørvágs kommunu, Sune Jacobsen**

SKÚLI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@osialurin.fo*



*Ætlandi stendur nýggjur musikkskúli uppi í Sørvági til næsta skúlaár. Gamli skúli verður umbygdur, og síðan verður ein tilbygningur bygdur aftrat, sum verður umleið 220 fermetrar stórur*

Gongst, sum Sørvágs kommuna ætlar, stendur ein nýggjur musikkskúli liðugur í Sørvági til næsta skúlaár.

Fríggjadagin í hesi vikuni skulu tilboðini upp á timbur- og snikkaraarbeiði verða komin bygdaráðnum í hendi, og tá verður eisini lisitatión yvir innkomin boð.

Útbjóðingartilfarið hevur ligið tøkt á kommunuskrivstovuni í Sørvági síðan hin 12. oktober, og nú fríggjadagin klokkan 13 er seinasta freist at bjóða upp á arbeiði.

Sune Jacobsen, borgarstjóri í Sørvágs kommunu, sigur, at ætlandi skuldu tilboðini verða inni klokkan 13 í dag, men av ávísum orsøkum er dagurin útsettur til fríggjadagin.

Hann sigur, at fleiri arbeiðstakarar hava verið á skrivstovuni hjá bygdarráðnum eftir útbjóðingartilfari, og tí væntar hann, at fleiri arbeiðstakarar fara at bjóða upp á skúlan.

### 300 fermetrar

Arbeiðið, sum er útboðið, snýr seg í høvuðsheitum um umbygging av gamla skúla, sum er umleið 90 fermetrar og um nýggjan tilbygning, sum verður umleið 220 fermetrar.

Suni Jacobsen sigur, at samanlagt verður nýggi musikkskúlin í Sørvági tilsamans 310 fermetrar stórur, og sambært tíðarætlanini stendur hann liðugur til næsta skúlaár.

Hann sigur, at skúlin í fyrsta lagi fer at geva tónleikaundirvísingini í Sørvági betri umstøður, eins og hugsandi er, at eisini hornorkestrið í bygdini fær betri venjingarumstøður.

- Nýggi skúlin fer uttan iva at skapar betri karmar um tónleikalív og ymisk mentanarlig tiltøk í kommuni í síni heild, sigur borgarstjórin í Sørvágs kommunu, Sune Jacobsen.

# PO Brookers roynir at selja trolbátar

**Mangt bendir á, at trolbáturin Vesturfarið verður seldur av landinum. Ein ávísur áhugi hevur verið vístur úr eitt nú Svøríki og Danmark, men enn er ilt at siga, hvørja lagnu trolbátarnir Vesturfari og Niclas fáa**

SKIP
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Vesturfarið og Niclas skulu helst seljast, áðrenn hetta árið er úti. Annars er hugsandi, at felagið, sum eigur bátarnar, verður lýst á tfingsilssølu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Í síðstu viku upplýsti eigarin av trolbátunum, Vesturfarinum og Niclasi fyri Rás2, at hann hevði borið Føroya Banka lyklarnar til bátar sínar, sum nú liggja í Vestmanna.

- Raksturin hongur ikki saman, og tí er einki at gera, segði hann.

Helgi Jespersen á vinnulívsdeildini hjá Føroya Banka sigur, at bankin og eigarin av Vesturfarinum og Niclasi hava gjørt avtalu um at royna at selja trolbátarnar í fríari sølu.

### PO selir

Tað er smápartafelagið PO Brookers, sum Petur Ove Kruse Johannesen eigur og rekur, ið nú roynir at selja báðar bátarnar fyri eigara og banka.

Petur Ove Kruse Johannesen sigur, at áhugi hevur verið vístur Vesturfarinum úr eitt nú Svøríki og Danmark, men ilt er at siga, hvussu langa tíð tað fer at taka at selja bátarnar.

Sum skilst, verður Vesturfarið helst seldur av landinum, meðan loyvini hjá trolbátinum verða verandi eftir í bólkinum 4T, sum eru bátarnir, ið plaga at fiska á landleiðini um sumrarnar.

Sambært lógini um vinnuligan fiskiskap, noyðist Føroya Banki helst at selja loyvini út til onnur feløg, sum virka í hesum bólki, áðrenn Vesturfarið verður seldur og strikaður úr føroysku skipaskránni.

Flestu bátar í bólki 4T hava ov fáar fiskidagar, og tí er hugsandi, at sølan av Vesturfarinum fer at gera, at nakrir fleiri dagar verða eftir til bátarnar, sum framvegis fiska í hesum bólki.

### Alternativið

Trolbáturin Niclas hevur ikki verið virkin í longri tíð, og tí kunnu loyvini hjá hesum báti neyvan seljast øðrum - uttan so, at báturin fylgir við.

Helgi Jespersen á vinnulívsdeildini hjá Føroya Banka sigur, at Vesturfarið og Niclas helst skulu verða seldir, áðrenn hetta árið er úti. Annars er hugsandi, at felagið, sum eigur báðar bátarnar, verður lýst á tvingsilssølu.